BÚNAÐARGRUNNURIN

Leiðbeining um fígging av vetrarbitskontuni eftir § 37a í lógini "Haugers styrelse og drift" frá 18. mei 1937, seinast broytt við løgtingslóg nr. 77 frá 25. apríl 2009

§ 1. Fyri at fáa umsókn viðgjørda skal skrivlig umsókn um fígging latast Búnaðargrunninum (víðari skrivað grunnurin) við viðkomandi upplýsingum: navn á umsøkjara, bústaður, matr. nr. á festinum, prísmeting av íløguni, eginfígging, hvussu nógv verður søkt um, onnur fígging, lýsing av íløguni, viðkomandi tekning/-ar og/ella kort, sum lýsa íløguna, lýsing av landbúnaðarvirkseminum, og tíðarætlan fyri arbeiðið

§ 2. Hevur festið 50 áseyðir ella meira sambært skrásetingini í "Hagar og seyðamark" v. Kára Thórsteinssyni 2007 ella seinni útgávu (ella "*Protokol over den i henhold til lov angaaende en ny skyldsætning af jorderne paa Faerøerne af 29. marts 1867 foretagne taxation af bemeddte jorder", vanliga nevnd Taxatiónsprotokollin 1873, Blaðstarv gav protokollina út uml. 1970*), skal festarin lata grunninum roknskap fyri seinastu 3 árini. Um eingin roknskapur er, skal skrivliga greiðast frá hví. Hevur festarin nýliga fest, skal greinað rakstrarætlan latast grunninum

§ 3. Eru færri enn 50 áseyðir skal skrivlig frágreiðing latast við umsóknini um raksturin. (tal av áseyði, tal av lombum, skurður (*tal av flettum seyði og miðalvekt, rakstrarløn*) nýtsla av kraftfóðuri, græsperlum, seyðahús – stødd, hoyggjhús, súrhoysbrunnar-, bø, o.a.)

§ 4. Eigur festið part í felagshaga ella aðrari felagsogn, kann festið fáa fígging eftir markatalinum/ ognar-partinum, um umsóknin annars lýkur treytirnar. Við umsóknini skal vera, umframt viðkomandi skjøl nevnd í §§ 1 og 2, upplýsing um matr. nr. hjá felagshaga/-ogn, **listi yvir eigararnar greinaður eftir ognarpartinum**, avrit av fundarbókini hjá haganum/felagnum: a) av síðuni við frásøgn um tá sitandi stýrið varð valt, b) av síðuni við frásøgnini tá avgjørt var at gera íløguna, og hvussu nógv søkjast skal um av vetarbitskontuni

§ 5. Krevur íløgan byggiloyvi frá kommununi, friðingarnevndini ella øðrum, skulu avrit av viðkomandi byggiloyvum latast við umsóknini

§ 6. Umsóknin skal verða latin grunninum í so góðari tíð, at møguligt er hjá grunninum at sýna umstøðurnar áðrenn nakað er gjørt av arbeiðinum, søkt er um fígging til

§ 7. Íløgan skal vera viðkomandi fyri landbúnaðarvirksemið og betra um raksturin á festinum

§ 8. Fíggjaðar verða bert íløgur í fasta ogn hjá festinum og ikki rakstur, umvælingar, leysafæ ella tilsvarandi

§ 9. Um ivamál eru, skilar grunnurin sær rætt til at biðja um at fáa uttanveltaða fakliga meting gjørda av landbúnaðarfrøðingi, verkfrøðingi ella øðrum viðkomandi serfrøðingi. Útreiðslur av møguligari uttan-hýsis meting verða goldnar av møguligari játtan

§ 10. Fígging av vetrarbitskontuni til velting verður fyrisitin eftir § 6 og 7 í reglugerðini fyri § 10a í lógini um Búnaðargrunn, uttan tá talan er um at fíggja velting úr nýggjum fyri mistan bø, sum tørvur er á

§ 11. Fígging av seyðahúsi av vetrarbitskontuni verður fyrisitin eftir § 9 í reglugerðini fyri § 10a og 10b í lógini um Búnaðargrunn, uttan tá talan er um at fíggja nýggjan bygning fyri mistan bygning, sum tørvur er á

§ 12. Grunnurin kann eftir umsókn og móti hóskandi veðhaldi fíggja írestandi fíggingartørv

§ 13. Meðan arbeiðið verður gjørt, verður tað fíggjað við láni tryggjað við transporti í fíggingini av vetrarbits-kontuni. Tá arbeiðið er liðugt, sýnt og góðkent verður lánið umfíggjað

§ 14. Grunnurin treytar sær við stuttari freist at kunna sýna umstøðurnar áðrenn nakað er gjørt, meðan arbeiðið gongur fyri seg og tá arbeiðið er liðugt

§ 15. Grunnurin kann treyta fíggingina av, at aðrir viðkomandi myndugleikar hava góðkent ætlanina

BÚNAÐARGRUNNURIN

§ 16. Fíggingin verður bert goldin móti útgreinaðari váttaðari rokning ella kvittan. Fyri felagshaga skal byggiroknskapur latast grunninum. Grunnurin kann krevja skjalainnlit í málið

§ 17. Um grunnurin ikki tekur avgerð um annað, kann veitti stuðulin heilt ella partvíst verða kravdur afturgoldin, um fíggingin av vetrarbitskontuni ella tað, sum henda fíggingin varð veitt til, í síni heild ella lutvíst, verður nýtt til annað endamál, enn tað varð játtað til

§ 18. Avgerðir hjá grunninum kunnu ikki kærast fyri landbúnaðarstevnuna ella annan fyrisitingarligan myndugleika, men kunnu kærast til rættin

§ 19. Henda leiðbeiningin kemur í gildi sama dag, sum hon er viðtikin av stýrinum fyri grunnin

Viðtikið á stýrifundi í Búnaðargrunninum 3. oktober 2016

Tórshavn 12.09.2016

Regin I. Jakobsen

stjóri